## Viðgera virðisgrundarlagið hjá Kringvarpinum

Á aðalfundinum hjá Kristiligum Lurtara- og Hyggjarafelag Kristi himmalsferðardag, verður pallborðsfundur, har Kringvarp Føroya er á skránni. Klokkan 15 Kristihimmalsferðardag verður aðalfundur hjá Kristiligum Lurtara- og Hyggjarafelag í Meinigheitshúsinum í Havn. Í sambandi við aðalfundin verður pallborðsfundur, har evnið: »Virðisgrundarlagi í Kringvarpi Føroya«. Tá Kringvarpið var skipað við eini útvarpsnevnd og eini sjónvarpsnevnd, hevði Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag umboð í nevndini. Felagið er ikki umboðað í stýrinum fyri Kringvarpið í dag. Pallborðsfundurin byrjar klokkan 17, og við pallborðið sita: Annika Mittún Jacobsen, Theodor E.D.Olsen, Elsa Lervig Østergaard og Roland í Skorini.




*Bogi Andreasen, leiðari í Margarinfabrikkini, og Linda Petersen, samskipari av verkætlanini »Ung í arbeiði«*

# Bjóða ungum arbeiði í summar

**Nú verður aftur høvi hjá 14 til 16 ára gomlum at melda seg til verkætlanina »Ung í arbeiði« í Tórshavnar kommunu, sum verður í gongd í fýra vikur, frá 29. juni til 24. juli. Eisini kunnu »eldri« ung melda seg til sum bólkaleiðarar hjá teimum yngru**

UNG Í ARBEIÐI
*Tíðindaskriv*

At ung sleppa at gera ymiskt fyrifallandi arbeiði, ið hevur til endamáls at fríðka um kommununa, er vorðið ein fastur siður í Tórshavnar kommunu mitt um summarið. Arbeiðið verður skipað soleiðis, at tey ungu sleppa til arbeiðis tvær vikur í part, svarandi til 80 tímar.

Umsøkjararnir skulu vera millum 14 og 16 ár og búgva í Tórshavnar kommunu, men er onkur eitt nú í skúlaaðrastaðni og flytur aftur til kommununa í summarfrítíðini, kann viðkomandi eisini søkja.

Tilmeldingin á heimasíðuni www.torshavn.fo byrjar mánadagin 25. mai klokkan 8 og er úti fríggjadagin 5. juni. Ein serlig tilmeldingarskipan er gjørd til heimasíðuna, har tey ungu skulu útfylla ávísar teigar, og eftir lokna tilmelding verður lutakast um, hvør fær kjansin hesa ferð.

– Tíverri hava vit vanliga ikki pláss fyri øllum, sum melda seg til. Men hesa ferð er skipanin soleiðis, at tey, ið ikki fingu arbeiði síðsta summar, í størst møguligan mun fáa framíhjárætt, so tey fáa arbeiði hesa ferð. Tó vilja vit heita á øll ung, sum annars ganga undir treytirnar, um at søkja, sigur Linda Petersen, sum er samskipari av verkætlanini »Ung í arbeiði«.

– Umframt, at vit sóknast eftir ungum, ið vilja sleppa til arbeiðis í tvær vikur í summar, sóknast vit eisini eftir bólkaleiðarum, ið kunnu standa fyri arbeiðinum hjá teimum ymsu bólkunum. Eisini tey kunnu søkja um starv umvegis heimasíðuna, og so finna vit tey best egnaðu.

### Arbeiða við gleði

Tað er Margarinfabrikkin, ið samskipar verkætlanina, tí har eru tey frammanundan von við líknandi uppgávur, so sum at arbeiða við verkætlanum, umframt at tey dagliga arbeiða við teimum ungu.

– Tí praktiska hava vit nógvar royndir av, og vit hava eisini allan tann neyðuga førleikan í húsinum, so tí er tað upplagt, at Margarinfabrikkin stendur fyri verkætlanini, sigur Bogi Andreasen, leiðari í Margarinfabrikkin, sum millum annað nevnir tað pedagogiska sum ein part av heildini.

– Vit eru von við at aktivera tey ungu, og tí kunnu vit eisini geva eitt nú bólkaleiðarunum góð ráð, tá teir skulu út at gera tað sama. Eisini hava vit ferð eftir ferð sæð, at gevur tú teimum ungu álit og ábyrgd, so vaksa tey við uppgávuni og fáa størri sjálvsálit, umframt at tey gera sítt arbeiði við gleði.

Linda og Bogi siga somuleiðis, at tey fegin hoyra frá fólki, sum hava uppskot um, hvat kann gerast av arbeiði í teirra nærumhvørvi. Á heimasíðuni hjá kommununi, har kunnað verður um »Ung í arbeiði«, ber beinleiðis til at koma við slíkum uppskotum, og eisini ber til at senda teldupost á linda@torshavn.fo.

Tað, sum tey ungu fara at gera, er alt møguligt, og tað kann bæði snúgva seg um at gera smáumvælingar, lúka, sópa gøtur, mála, rudda og annað – alt eftir tørvi.

Av tí at lutakast er millum tey, sum søkja um at fáa arbeiði, er tað líka mikið, um tú ert fyrstur ella síðstur at melda teg til. Arbeitt verður átta tímar um dagin, frá klokkan 8 til klokkan 16, og tey ungu verða sett eftir vanligum setanartreytum og lønt eftir sáttmálaavtalaðu tímalønini hjá Havnar Arbeiðsmannafelag.

## 3,5 milliónir til røktarkrevjandi

**Almannaráðið kunngerð í dag, at eykajáttan er fingin áljóðandi 3,5 milliónir krónur. Játtanin skal nýtast til teirra, ið hava bráðfeingistørv fyri neyðini**

ALMANNAMÁL
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Landsstýriskvinnan í almannamálum, Rósa Samuelsen, kunngerð í dag, at eykajáttanin á 3,5 milliónir krónur eru oyramerktar til tey, ið hava bráðfeingistørv á búðplássi í Suðurstreymoy fyri neyðini.

"Sum øllum kunnugt mangla vit røktarheimspláss í Suðurstreymi, og heimarøktin hevur tíverri ikki havt nokk starvsfólk til at kompensera fyri hendan tørvin. Tað hevur merkt, at eitt nú avvarðandi hava verið noydd at traðka til. Við eykajáttanini verður møguligt at fáa fleiri hendur til tey røktarkrevjandi eldri í Suðurstreymi, so hesi kunnu fáa eina nøktandi tænastu", sigur Rósa Samuelsen í tíðindaskrivi í dag.

Umleið 80 eldri fólk standa á bíðilista hjá Nærverkinum. Tey, ið hava størst tørv á búðplássi, eru brúkarar, ið hava tørv á heimahjálp fýra ferðir um dagin.

## Órógv á bókingarskipanin hjá Atlantic

**Atlantic Airways noyddist brádliga at skifta til nýggja skipan, áðrenn hendan var endaliga liðug. Tað hevur órógvað tey, ið hava roynt at keypt sær ferðaseðil umvegis heimasíðuna**

ÓLAG
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Atlantic Airways hevur fólk arbeiðandi við fullari megi fyri at fáa nýggju skipanina at koyra sum hon skal. Gamla skipanin mátti skiftast út brádliga tann 5. mai, tí veitarin legði sítt virksemi niður. Arbeitt hevur verið við nýggjari skipan í eitt ár, sum er lítið samanborið við hvussu leingi verður arbeitt við líknandi skipanum aðra staðni.

- Skipanin er eitt sindur amputerað fyri tíðina. Sum er mugu fólk ringja og gjalda í staðin fyri at gjalda umvegis netið. Men ein av fyrstu døgunum fer at bera til gjalda við kortið umvegis netið aftur. Tað, sum hendi var, at skiftið gjørdist so brádligt, at vit fingu ikki tíð at testa nýggju skipanina rættiliga, áðrenn vit noyddust at taka hana í brúk, sigur Theodor Joensen, sum starvast á marknaðardeildini hjá Atlantic Airways.

Fólk hava gjørt vart við broytingarnar í skipanini, og Theodor Joensen viðgongur, at onkrar broytingar kunnu ørkymla viðskiftafólkini. Í staðin fyri bert at síggja ferðir til Billund til dømis, vísir skipanin á møguleikar fyri at flúgva til Billund umvegis Keypmannahavn.

- Tað, sum er broytt, er at vit bjóða fleiri møguleikar. Hetta er ein skipan, sum verður brúkt um allan heim, og fólk fara ivaleyst at gerast glað fyri hana, tá tey hava vant seg við hana.